# Fyrsti finalisturin í Nósabarnaprix 2003 funnin

**Soffía Lind Rasmussen úr Klaksvík vann fríggjakvøldið fyrsta undanumfari av Nósabarnaprix 2003, sum var í KÍ høllini**

NÓSABARNAPRIX 2003
*Solby A. Eliasen*



*Soffía Lind Rasmussen vann fyrstu undankappingina av Nósabarnaprix 2003 við sanginum: Minnist tú hitt summarið*

**Klaksvík:**
Tað var ein vælupplagdur James Olsen, sum setti fyrsta undanumfari av Nósabarnaprix 2003 ígongd. Tíggju vælfyrireikaðir luttakarar vóru við, og talan var bert um gentur. Nógvar teirra høvdu gjørt nógv burturúr, og fleiri høvdu millum tveir og fýra dansarar við sær á pallin. Og endin var, at 10 ára gamla Soffía Lind Rasmussen úr Klaksvík streyk avstað við fyrsta finaluplássinum. Somuleiðis fer Soffía í upptøkustudio við James Olsen, og hon verður ein teirra, sum skal við á Nósabarnaprix-fløguna, sum kemur á marknaðin beint fyri Ólavssøku. Sjálvandi verður hon so eisini at síggja millum luttakararnar í finaluni, sum verður í Badmintonhøllini í Havn Ólavssøkuaftan.

Tá umfarið var av, høvdu tilsamans okkurt um 25 børn verið á pallinum við sangarum og dansarum. Og ongin ivi var um, at James dugdi væl at gera tað spennandi, tá hann skuldi kunngera vinnaran. Hann gav sær góðar stundir, og spenningurin millum luttakarnar, sum allar stóðu á pallinum vaks og vaks. Hann byrjaði við at siga, hvør bleiv nummar trý. Og tað gjørdist tann einans 7 ára gamla Birgit Sivertsen úr Klaksvík. James Olsen helt fyri, at hon við sangi sínum, Tína dýrd tú offraði, hevði rørt mong hjørtu hetta kvøldið. Nummar tvey gjørdist Karin Haraldsen við sanginum Eg veit og Soffía Lind Rasmusssen vann sum sagt við sanginum hjá Maluni Eyðunsdóttur, Minnist tú hitt summarið.

Mamma Soffíu, Dagmar, segði beint eftir, at hon varð kosin vinnari, at hatta hevði hon ikki væntað.

– Soffía hevur ikki vant nógv, og eg slapp ongantíð at hoyra hana, áðrenn hon trein á pallin í kvøld, so eg hevði onga hóming av, hvussu hon fór at klára seg, greiddi hon frá. Men tað var sera spennandi hjá teimum mongu luttakarunum hetta kvøldið, og hóast áskoðarafjøldin má sigast at hava verið eitt satt vónbrot hjá fyrireikarunum, so eydnaðist hetta undanumfarið bara heilt væl.

Næsta undanumfar verður í tjaldinum í Kollafirði á Sundalagsstevnuni komandi leygarkvøld klokkan 19. Kostnaðurin er 100 krónur, men børn undir skúlaaldur rinda 40 krónur. Tiltakið er stuðlað av Føroya Bjór.

# Karsten vrakar sáttmálan enn einaferð

**Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum Karsten Hansen boðaði mánamorgunin frá, at hann ikki fer at góðkenna ískoytissáttmálan millum SEV og Maskinmeistarafelagið. Vandi er nú fyri streymloysi**

SÁTTMÁLALOYSI
*Stefan í Skorini*



*Karsten Hansen hevur vrakað sáttmálan, sum SEV og Maskinmeistarafelagið vóru komin ásamt um. Vandi er nú fyri, at maskinmeistararnir leggja arbeiði niður*

Karsten Hansen ræðist ikki hóttanina frá Maskinmeistarafelagnum um at leggja arbeiði niður, varð sáttmálin hjá teimum við SEV ikki góðkendur á hesum sinni. Landsstýrismaðurin vrakaði nevniliga nýggja ískoytissáttmálan, ið SEV og Maskinmeistarafelagið høvdu gjørt, og sum partarnir vónaðu, at Karsten fór at góðkenna.

– Eg kann ikki lata meg stýra av hóttanum um arbeiðssteðg, og eg má nýta tey amboð, sum eg havi, at stýra búsakapinum við. Tað er einki, sum rættvísgerð eina slíka lønarhækking, sigur Karsten Hansen, sum tó ásannar, at maskinmeistararnir situr í eini lyklastøðu, tí ein arbeiðssteðgur hevur við sær, at landið verður myrkalagt.

Eg heiti nú á partarnar um at fara aftur til samráðingarborðið, tí tað er einasta gongda leið, segði Karsten Hansen á tíðindafundi mánamorgunin.

### Sami sáttmáli

SEV og Maskinmeistarafelagið vóru blivin samd um at gera ein ískoytissáttmála til tann tvey ára sáttmálan, sum Karsten ikki vildi góðkenna. Hesin ískoytissáttmáli á eitt ár gav maskinmeistarunum eina lønarhækkan á trý prosent. Lønarhækkingin í tí vrakaða tvey ára sáttmálanum táttar í tey ellivu prosentini. SEV vísti á, at við ískoytissáttmálanum verður miðallønarhækkingin á leið tað sama sum á privata arbeiðsmarknaðinum.

– Hetta er í veruleikanum tann sami sáttmálin, sum longu er vrakaður einaferð.

### Døpur búskaparútlit

Karsten Hansen vísir á, búskaparútlitini eru sera døpur, og at tey gerast alsamt daprari. Tí kann hann ikki góðkenna hendan sáttmálan.

– Vit mugu ansa sera væl eftir, at lønarútreiðslur ikki hækka ótálmað, og tí verður samlaði sáttmálin vrakaður, sigur landsstýrismaðurin.

Karsten Hansen er sinnaður at góðkenna somu lønarhækking, sum fakfeløgini á privata arbeiðsmarknaðinum gjørdu við Føroyar Arbeiðsgevarafelag, tí hesin sáttmálin hevur lagt støðið. Ráðini hjá Karsteni eru tí at hyggja eftir tí sáttmálanum, tá nýggjur sáttmáli skal gerast.

### SEV visti

Karsten Hansen upplýsti eisini á tíðindafundinum, at SEV longu hóskvøldið fekk at vita frá umsitingini í Fíggjarmálaráðnum, at hesin ískoytissáttmálin ikki verður góðkendur. Tó skuldi alt vikuskiftið fara afturum bak, áðrenn almenningurin og Maskinmeistarafelagið blivu kunnað um hetta.

Um maskinmeistararnir hjá SEV leggja arbeiði niður er væntandi, at Løgtingið leggur uppí.

## Vandi fyri arbeiðssteðgi

**– Tá sáttmálin ikki verður hildin, hava vit fullan rætt til at kalla okkara menn heim, sigur Jógvan Nybo, formaður í Maskinmeistarafelagnum**

Sosialurin fekk fatur á Jógvani Nybo beint fyri evstamark mánadagin, tá Karsten Hansen hevði boðað frá, at hann ikki fór at góðkenna sáttmálan.

– Vit fara ikki at samráðast einaferð enn, tí vit hava longu ein sáttmála, sigur Jógvan Nybo til áheitanina frá landsstýrismanninum um at fara aftur til samráðingarborðið.

Hann vildi tó ikki siga nakað beinleiðis um, hvørji tiltøk Maskinmeistarafelagið nú fer at seta í verk.

– Vit hava ikki so nógv amboð at nýta í hesum stríðnum, men fyrst fara vit at boða SEV frá okkara tiltøkum, segði Jógvan Nybo um middagsleiti mánadagin.

Tað er øllum greitt, at um maskinmeistararnir hjá SEV verða kallaðir heim, so verður streymurin slitin.

**-stefan**

## Atlants Kolvetni skjótt framleiðandi

OLJUVINNA
*Jan Müller*

Atlantic Petroleum hevur aðalfund týsdagin. Eftir vanliga aðalfundin fer ein av "veteranunum" á føroya-økinum Richard Hardmann at halda fyrilestur um oljuleitin, oljuprísir ol. Hann stóð í mong ár á odda fyri virkseminum hjá Amerada Hess í Føroyum. Sosialurin skilur annars, at føroyska oljufelagið er komið væl áleiðis við sínum ætlanum at gerast eitt framleiðandi oljufelag. Samráðingar hava verið við fyritøkur, sum virka olju á bretska landgrunninum. Tann fyrsta avtalan av slíkum slag er við at vera klár og verður helst undirskrivað í næstum. Tað snýr seg um eina upphædd uppá millum 50 og 100 mill kr. og er fíggingin við at koma

# ítróttur

Nr. 111 • týsdagur • 17. juni 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo



Drúgv frásøgn frá kappróðrinum á fjarðarstevnu verður í blaðnum í morgin

# Heimavøllurin framvegis ótryggur

**Fýra lið hava framvegis ikki tapt, og bæði hjá VB og Skála er støðan alt annað enn góð**

5. UMFAR SAMANUM
*Jóannes Hansen*



*Ein ovurfegin Messias Pereira, eftir at hann hevur javnað fyri NSÍ í grannauppgerðini. Men úrslitið sýnir samstundis, hvussu tungt tað tyksti at fáa fulla úrtøkur úr heimavøllinum í ár*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað er hásummar, og verðurlíkindini vóru tey bestu, tá ið fimta umfarið í 2003 landskappingini varð spælt um vikuskiftið. Hagtalsliga tørnaði tað akkurát út, sum tað hevur gjørt undanfarnu fýra umførini. Hesa ferð vóru tveir heimasigrar og tveir útisigrar, og ein uppgerð endaði við javnleiki. Tilsaman eru 26 uppgerðir avgreiddar. Átta ferðir hevur heimaliðið vunnið, níggju ferðir hevur útiliðið vunnið, og níggju ferðir hevur tað verið javnt.

Tað vórðu skorað fleiri mál hesa ferð, enn tað hava verið í nøkrum av undanfarnu umførunum, men higartil hevur talan ikki enn verið um stórsigrar av tí slagnum, sum tað undanfarnu árini hava verið fleiri av.

HB, KÍ og GÍ eru oddalið. HB er ovast, tí teir hava betri málmun enn klaksvíkingar. Áðrenn málmunurin verður roknaður siga ásetingarnar, at tað skal hyggjast eftir innanhýsis uppgerðunum. HB og KÍ hava ikki spælt enn. Fyrri dysturin millum næstan 99 ára gomlu javnaldrarnar verður í níggjunda umfarinum, sum er á skránni sunnudagin 6. juli. Tá fær KÍ vitjan av HB. KÍ er frammanfyri GÍ. Liðini spældu í fyrsta umfarinum í Gøtu, og tá vunnu klaksvíkingar 1–0. Teir eru altso betri í innnhýsis uppgerðum við GÍ.

### Undarligt býti

Vit hava longu tvær ferðir fyrr í ár víst á tað óhepna í, at tað fleiri ferðir hevur verið rættuliga stutt ímillum umførini. Hetta hevur við sær, at arbeiðstreytirnar hjá fjølmiðlunum ikki eru góðar. Feløgini royna at lívga áskoðararnar við at geva leikskráir út (tað gevur ikki so lítið í lýsingainntøkum til feløgini), og tá ið tað er heilt stutt millum heimadystirnar kemur tað meiri enn so fyri, at leikskráin til ein heimadyst skal prentast, áðrenn umfarið frammanundan hevur verið spælt.

Undan summarsteðginum verða aftur spæld fýra umfør í tvær vikur. Sjeynda og áttanda umfarið eru ásett at verða spæld annan sunnudag – 29. juni – og mikudagin aftaná, sum er 2. juli, og 9. og 10. umførini skulu spælast sunnudagin 6. juli og mikudagin 9. juli. Hetta er framvegis óheppið.

Tað er heldur ikki heilt lætt at skilja, hví býtið millum heimavøll og útivøll er so misjavnt, sum tað er í skránni. Ynskið hjá feløgunum er ivaleyst, at tað verður skift ímillum, soleiðis at tey so vítt, sum tað á nakran hátt ber til, eru aðru hvørja ferð á heimavølli og aðru hvørja ferð á útivølli. Soleiðis er tað ikki í ár.

Í fimm teimum fyrstu umførunum hava HB og NSÍ bara eina ferð verið á útivølli, meðan B36 og B68 bara eina ferð hava átt heimavøll.

### Toppurin tættur

Fyri fjúrtan døgum síðani vístu vit á, at í nógvum førum hava uppgerðirnar millum oddaliðini endað við javnleiki. Hesa ferð var toppdysturin í Runavík, og hann endaði aftur við javnleiki. 1–1 ber við sær, at NSÍ og B68 framvegis eru ósigrað.

GÍ og HB vunnu sannførandi heimasigrar. Tað kundi kanska roknast við, at B36 ikki fór at verða heilt væl fyri, nú teir í næstan tvær vikur ikki høvdu havt fýra av landsliðsspælarunum til venjingar, meðan tann fimti, Julian Johnsson, heilt er burtur úr felagnum. Men B36 vann fyri aðru ferð á rað á útivølli, og nú kann tað verða so skjótt, at teir eftir skinklandi fyrstu umførini fara at koma sær millum tey ovastu. Sunnudagin verður kanska mest áhugaverda uppgerðin í Gundadali, har B36 fer at fáa vitjan av KÍ.

Klaksvíkingar hava higartil fingið fult á útivølli. Teir hava vunnið í Gøtu, á Eiði og á Skála, meðan teir framvegis ikki hava fingið fult í Klaksvík. B36 hevur bara spælt á heimavølli ímóti EB/Streymi, og tá royndist tað illa hjá B36.

HB skal í fyrsta útidystinum síðani javnleikin í Runavík til Vágs, har teir altíð hava havt ivaleyst at takast við. B68 fær vitjan av FS Vágum, NSÍ skal til Eiðis, meðan GÍ skal spæla í Intertoto Cup. Uppgerðina í sætta umfarinum á heimavølli ímóti Skála hava teir gjørt burturav sær fyri longari tíð síðani. GÍ vann 2–1.

### Botnurin tyngist

Á niðastu plássunum eru Skála og VB. At skálamenn skuldu vera við í stríðnum um at sleppa undan niðurflytingini hevur verið roknað við alla tíðina. Meiri óvæntað er tað, at vágbingar skulu liggja so tungt í sjónum. Fyri aðru ferð á rað vóru teir í Eysturoy, har teir áður ofta hava staðið seg væl, uttan at fáa stig og uttan at skjóta mál. At VB er í kroystari støðu ger neyvan uppgávuna hjá HB í Vági sunnudagin lættari. Annan sunnudag skal Skála til Vágs, og tá verður talan um sannan botngysara.

Vágamenn hava havt ætlanir um at stríðast aðra staðni enn í botninum. Men teir tykjast hava ilt við at gera ætlanina til veruleika. Higartil hava teir spælt tríggjar ferðir á heimavølli, og teir hava bara fingið eitt stig burturúr – 1–1 ímóti EB/Streymi.

EB/Streymur legði sannførandi fyri, tá ið teir eftir javnleikin á heimavølli ímóti B68 vunnu í Gundadali ímóti B36, men síðani hevur tað ikki hilnast so væl. At onkrir lyklaspælarar eru burturi frá tykist kennast serliga meint. Sunnudagin fer NSÍ til Eiðis, og tað verður ivaleysa strevið hjá heimaliðnum á Mølini. Hjá NSÍ er einki sum eitur. Skulu teir hugsa um at vinna fyrsta FM heitið nakrantíð, so er kravið, at teir fáa fult í sovornum útidystum.